Álit

í

løgtingsmáli nr. 34/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnuna (Áseting av lofti í tøkugjaldinum fyri part av laksaframleiðsluni, sum fer til meirvirking)

Erhard Joensen, Helgi Abrahamsen, Kaj Leo Holm Johannesen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Johan Dahl og Magnus Rasmussen, løgtingsfólk, hava vegna Sambandsflokkin lagt málið fram 24. oktober 2023, og eftir 1. viðgerð tann 8. november 2023 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13., 14. og 15. november 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Búskaparráðið, Mowi, Bakkafrost, Hiddenfjord og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minniluti (Erhard Joensen og Eyðdis Hartmann Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:

Grundin til, at Sambandsflokkurin legði hetta uppskotið fyri Løgtingið er, at mett varð, at broytingin, sum bleiv gjørd í lógini um loyvisgjald á alivinnuna í maj 2023, hevur haft sera óhepnar avleiðingar fyri m.a. møguleikan hjá vinnuni at gera avtalur fyri meirvirkaðar vørur.

Í alihøpi finnast fleiri mátar at prístryggja sína framleiðslu uppá. Ein máti at tryggja seg uppá er sokallað “hedging” av pørtum av framleiðsluni, t.v.s., at partur av framleiðsluni verður seldur til ein frammanundan avtalaðan prís. Søguliga hevur hetta verið nógv brúkt, kanska serliga í Norra, tí prísirnir á laksi sveiggja nógv ígjøgnum árið.

Ein annar máti at prístryggja seg uppá er at meirvirka vørur, sum eisini verða bundnar í sáttmálum, sum vara í styttri og longri tíðarskeið, oftani varandi í 3-12 mánaðar.

Hesin minnilutin metir, at hendan broytingin kann loysa upp fyri eini fastlæstari støðu viðvíkjandi meirvirkaðum úrdráttum, sum er íkomin, eftir at tøkugjaldsstigin bleiv broyttur og hækkaður munandi í vár.

Upplýst er fyri nevndini, at progressiviteturin og longdin á tøkugjaldsstiganum er høvuðsorsøkin til, at m.a. tann eina fyritøkan ikki metir seg at vera kappingarføra longur á marknaðinum, og at tey tískil nærum ikki hava kunnað gjørt sáttmálar um meirvirkaða vøru galdandi fyri árið 2024, við harav fylgjandi hópuppsagnum.

Hetta undirbyggir, at tøkugjaldsstigin, sum vit kenna hann í dag, ikki er rætta amboðið at krevja pening inn frá vinnuni, hvørki fyri vinnuna ella fyri samfelagið, tí hann er stýrandi fyri, hvat vinnufyritøkurnar velja at gera við sína framleiðslu og serliga, hvat fyritøkurnar frávelja at gera við sína framleiðslu.

Hesin minnilutin heldur, at hetta er ein vanlukka fyri føroyska samfelagið og serliga fyri tey økir í landinum, har hetta rakar, tí hetta kann bara føra við sær, at vit missa støðug og hampiliga væl lønt arbeiðspláss av landinum til stórt ógagns fyri bæði kommunukassarnar og landskassan og trivnaðin í samfelagnum sum heild.

Men serliga er hetta ein vanlukka fyri tey starvsfólk og tær familjur, hvørs inntøkugrundarlag hvørvur grundað á ein tøkugjaldsstiga, sum er oyðileggjandi fyri, at teirra arbeiðspláss kann halda fram.

Undir viðgerðini av hesum uppskotinum hevur nevndin tí eisini umrøtt, um tað eru aðrir og betri hættir at taka gjald frá alivinnuni uppá, sum eru smidligari og minni darvandi fyri vinnuliga rásarúmið hjá alifyritøkunum enn verandi tøkugjaldsstigi, og sum ein breið politisk semja kann fáast um, fyri harvið at fáa eina varandi skipan. Eisini er nevndin vorðin samd um, at útgangsstøðið fyri eini møguligari nýggjari skipan eigur at verða, at hon ikki er stýrandi fyri, hvussu alifyritøkurnar disponera sína framleiðslu, og at hon tryggjar framhaldandi kappingarføri hjá vinnuni.

Hesin minnilutin heilsar hesum vælkomnum og er til reiðar konstruktivt at fara undir eina breiða politiska tilgongd fyri at finna ein nýggjan leist at krevja gjaldið inn frá alivinnuni.

Tó ásannar hesin minnilutin, at slík tilgongd kann taka drúgva tíð, og í hesum sambandi meta vit, at verandi uppskot frá Sambandsflokkinum um at seta eitt loft á 7,5% á tann partin av laksaframleiðsluni, sum fer til meirvirking, er ein stórur bati fyri bráðfeingis støðuna í vinnuni, inntil man møguliga er vorðin samdur um eina aðra skipan.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:

Hetta er triðja álitið, sum verður skrivað um tøkugjald innan fyri sera stutta tíð.

Grundhugsanin hjá hesum minnilutanum er framvegis hin sama. Tað besta fyri alivinnuna er, at tað verður álagdur ein hægri partafelagsskattur. Víst verður til viðmerkingarnar hjá sama minniluta í løgtingsmáli nr. 93/2022 og løgtingsmáli nr. 73/2022.

Orsøkin er einføld. Tað er einans partafelagsskattur sum skipan, sum ikki er atferðarstýrandi. Við eini skipan, har partafelagsskattur verður lagdur á vinnuna, hevur politiska skipanin ikki beinleiðis ávirkan á avgerðir um, hvat skal framleiðast, og hvussu íløgur verða raðfestar.

Verandi tøkugjald hevur ein toppskatt uppá 20%, t.v.s. ein bruttoskatt uppá 20%. Hetta er ógvuliga høgt, og varð tað ávarað frá fleiri síðum um, at hetta kundi fáa ógvusligar negativar avleiðingar. Vit kunnu bara staðfesta, at tær avleiðingarnar, sum ávara varð ímóti, eru nú veruleiki.

Hetta uppskotið sigur: ”Fyri partin av laksaframleiðsluni, sum verður brúktur til víðari framleiðslu, verður tøkugjald goldið eftir hesari løgtingslóg, tó upp til í mesta lagi 7,5%”, hetta er t.d. VAP framleiðsla og fløk.

Harvið sigur uppskotið eisini, at allar aðrar framleiðslur framvegis hava ein toppskatt uppá 20%.

Sostatt verður ein stórur ójavni innførdur í skipanina, sum sannlíkt verður atferðarstýrandi, tá alifeløgini skulu avgera, hvørjar vørur skulu framleiðast.

Sum heild kann sigast, at hetta ikki er ein góð skipan.

Fyri at loysa tann akutta trupuleikan, sum alivinnan er komin í av verandi tøkugjaldsskipan, kann hetta tó vera ein millumskipan, til ein endalig skipan kann verða samtykt.

Ein endalig skipan fyri avgjøld á alivinnuna eigur at hava partafelagsskatt sum høvuðskomponent.

Tó er ein blandingsskipan sum tann, ein arbeiðsbólkur í 2014 gjørdi um loyvisgjald í alivinnuni, eisini ein møguleiki. Hetta skjalið er nevndarskjal og kallast «Upprit um loyvisgjald á alivinnu».

Arbeiðsbólkurin kom fram til, at ein lítil partur skal vera tøkugjald og tann størri parturin ein partafelagsskattur.

Heitt verður á landsstýrismannin um at koma í Løgtingið við einum uppskoti, grundað á hetta princippið, sum skjótast.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein triðji minniluti (Annika Olsen, Karlot Hergeirsson og Uni Holm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Avbjóðingar við tøkugjaldsstiganum, tá ræður um víðari virkaðar vørur, ella VAP framleiðslu, eru ikki eru ikki nýliga ikomnar. Hóast tøkugjaldsstigin er nakað hægri í dag, enn hann var í fjør, so hava vit upplivað uppsagnir áður á eitt nú Bakkafrosti, tí tað ikki hevur loyst seg at gjørt sáttmálar fyri víðari virkaðar vørur, sum tískil hevur ført við sær uppsagnir.

Minnilutin ásannar, at VAP framleiðslan er sera týdningarmikil fyri føroyska samfelagið, tí hetta skapar nógv arbeiðspláss og hevur nógvar jaligar ringvirknaðir kring landið.

Undir viðgerðini av málinum er tað tó komið fram, at uppskotið hjá Sambandsflokkinum ikki loysir avbjóðingarnar við VAP framleiðsluni. At gera eina serskipan fyri VAP framleiðlsuna við einum hægsta gjaldi á 7,5 % er atferðarstýrandi fyri vinnuna, og politiskt leggur man seg uppí, hvussu vinnan skal raðfesta. Hetta vístu eisini flest øll, sum vóru til hoyring í málinum, á, og mæltu frá hesari skipan. Aktørar í alivinnuni vóru heldur ikki fyri serskipanum og mæltu eisini frá at samtykkja hetta uppskotið.

Hesin minnilutin vil ynskt, at Vinnunevndin gav sær eitt sindur meira tíð at viðgerða loyvisgjaldskipanna í alivinnuni sum heild, tí undir viðgerðini í nevndini hevur hesin minnilutin ein varhuga, og eina trúgv uppá, at tað er møguligt at finna eina breiða semju um, hvussu skipanin eigur at vera frameftir, um ein gevur sær ta tíð sum skal til fyri at finna eina semju.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 23. november 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Karlot Hergeirsson	